

–Tað er stuttligari at vera lærari enn næmingur, halda tær. Katrin og Oda eru í starvsvenjing í Tórshavnar kommunuskúla Mynd: Vilmund Jacobsen

# –Nú eru tað vit sum bestemma!

**Oda og Katrin, sum ganga í 9. flokki á Toftum, eru í starvsvenjing í Tórshavnar kommunuskúla, har tær saman við lærarum undirvísa næmingum í 2. flokki**

UNGIR LÆRARAR

*Beinta K. Jacobsen, starvsnæmingur*

–Hetta er ordiliga skeg, og okkum dámar sera væl.

Tað siga tær báðar, Oda Højgaard og Katrin Højgaard, sum ganga í 9. flokki á Toftum.

Tær eru 15 ára gamlar og eru nú í starvsvenjing í Tórshavnar kommunuskúla, har tær saman við lærarum undirvísa børnum í 2. flokki.

Vit spurdu tær, um tær eisini høvdu onnur ynski, tá ið tær søktu um praktikkpláss?

Katrin sigur, at hon í fyrsta lagi ynskti at sleppa til Beauty Care í Runavík, men tað ikki til.

Oda sigur, at hon sum nummar eitt søkti um at sleppa til Advokatskrivstovuna, og tað bar heldur ikki til.

–Tá ið Oda so fór í Tórshavnar kommunuskúla, fór eg bara eisini har, sigur Katrin.

Hvat dámar tykkum í Kommunuskúlanum?

–Okkum dámar ordiliga væl, og vit trívast væl.

Tær eru samdar um, at tað er stuttligari at vera lærari enn næmingur – altso at sita hinimegin borðið.

–Nú eru tað vit sum bestemma, og tað virkar ordiliga løgið, siga tær.

Tær halda, at tað er stuttligt at vera lærari – í hvussu er í nakrar dagar.

–Eg helt, at eg fór ongantíð at tíma at verða lærari, men tað haldi eg ikki longur, sigur Katrin.

Katrin og Oda halda, at tað er strævnari at vera lærari enn næmingur.

–Jú, hetta er stuttligt, men eitt sindur strævið viðhvørt.

Tær halda, at næmingarnir eru ógvuliga fittir, men eitt sindur buldrutir viðhvørt.

–Soleiðis man tað vera í øllum flokkum, siga tær.

Kundu tit hugsað tykkum at verið lærarar?

–Ja, eftir at hava verið her í nakrar dagar, kundu vit faktisk hugsað okkum tað, siga Katrin og Oda, sum saman við lærarum hava undirvíst børnum í 2. flokki.

Tað eru tveir 2. flokkar í Tórshavnar kommunuskúla.

–Eg havi undirvíst í øðrum og Oda í hinum, sigur Katrin.

Í tímunum hjálpa tær børnunum at rokna og lesa, um tey ikki duga.

–Vit hava eisini svomið við næmingunum og skulu eisini hava fimleik saman við teimum, siga toftagenturnar, sum búgva í Havn, meðan tær eru í starvsvenjing.

## Ákærdur føroyingur møtti ikki í rættinum

Ein 42 ára gamal føroyingur varð tann 25. november í fjør handtikin við Clickimin ítróttardepilin í Hetlandi. Tríggjar dagar seinni varð hann í rættinum ákærdur fyri at hava verið ónærisligur mótvegis tveimum 9 og 10 ára gomlum dreingjum.

Í rættinum vildi føroyingurin ikki viðganga seg sekan, og tí varð veruligt rættarmál ásett til 19. januar. Føroyingurin varð leyslatin móti at stilla trygd, men tá rættarmálið skuldi fyri í gjár, var tann ákærdi ikki at síggja.

**-mørk**

## Blanding og 200 í TB húsinum



**Leygarkvøldið fara tveir spennandi og sera ymiskir bólkar á pallin í TB-húsinum. Talan er um bólkin 200 og lokala bólkin Ein Blanding**

TÓNLEIKUR

Leygarkvøldið verður ein spennandi tónleikablanding at hoyra í TB húsinum. Bólkurin 200 fer á pallin. Bólkurin er vorðin kendur við tjóðskaparpunki og ofta argandi tekstum afturvið væl ljóðandi og vælspældum punktónleiki. 200 er millum heitu nøvnini innan føroyskan tónleik í løtuni. Tað eru Niels Arge Galán, Mikal Blak og Uni Árting, ið manna 200.

Bólkurin Blanding er meira lokalur, men spælir av og á. Manningin er úr Vági og av Tvøroyri og talan er fyri tað mesta um royndar tónleikarar úr ymsum hópum. Bólkurin spælir, sum navnið bendir á, eitt bland av tónleiki. Alt frá góðum, gomlum føroyskum, til tað nýggjasta, ið er at finna á ymsu hitt-listunum. Tey, ið manna blanding eru Jonhild A. Nielsen, Knút H. Nielsen, Hjalmar Magnussen, Dagfinn Olsen og Neil Joensen.

Lagt er upp til eitt væl blandað kvøld í TB húsinum leygarkvøldið.

Óli P 70 ár

Móttøka í Miðlahúsinum



Í sambandi við at Óli P verður 70 ár týsdagin 24. januar verður móttøka í Miðlahúsinum henda dagin frá kl. 15 til 17.

Øll eru vælkomin

miðlahúsið
í Vágsbotni